# til jólaborðhaldið?







## Taskan:



Tá tað kemur til taskur, er vetrarmótin ógvuliga breiður. Vit síggja alt frá heilt stórum taskum, ið minna mest um ítróttartaskur, til smáar pungar og heilt smáar eskjur við honk, ið bert hava rúm fyri visakortinum og eini varrastift.

Taskurnar frá sniðgevunum eru tó næstan ikki keypandi, tí tær eru so dýrar. Men av tí, at taskan er ein týðandi partur av tilhoyrinum, eru fleiri heimasíður, ið leiga hesar dýru og smartu taskurnar út. Hesar heimasíðurnar fylgja væl við, og fáa allar tær nýggjastu taskurnar frá stóru sniðgevunum rættiliga skjótt eftir, at tær koma á marknaðin.

Leitar tú á netinum finnur tú eitt ótal av hesum heimasíðunum, her eru bert nøkur fá uppskot. Ymiskt er hvørjar treytirnar og prísirnir eru, so tað er vert at kanna tað væl, áðrenn leigað verður. www.handbaghirehq.co.uk, www.kissmybag.com, www.bagborroworsteal.com, www.frombagstoriches.com , www.fashionhire.co.uk



## Skógvarnir:

## Sokkabuksurnar:



*Vera Wang*



*Eleyki Shimoto*



*Paul Smith*



*Jean Paul Gaultier*

Skógvarnir skulu í vetur vera høghælaðir, og høgir hælir hóska sera væl saman við lítla svarta kjólanum.

Mótin við skóm, ið røkka upp á øklarnar, heldur fram, men nú verður spakuliga farið frá rúmligu og rundu 70'ara skónum og yviraftur til spísku skógvarnar, har tærnar ikki hava tað serliga rúmsátt.

Tað er eingin ivi um, at sokkabuksurnar í vetur skulu vera littar. Svartar sokkabuskur eru í løtunum bannlýstar á mótapallunum kring heimin, og flestu av stóru sniðgevunum vísa sokkabuksur í sterkum og øðrvísi litum.

Hyggja vit at yvirklæðunum, so er munurin ikki so stórur frá í fjør. Vit hava enn dupultknappaða frakkan, sum í ár bert hevur fingið nakrar eyka smálutir.

Armystílurin, sum kom fram í fjør, heldur eisini fram í vetur.

Ìblásturin frá stílfullu 40'unum heldur eisini fram, við ¾ ermum og pyramidusniði.

Eitt nýtt snið er tó komið afturat innan yvirklæðir, tí í vetur síggja vit nógvar kápur og poncho. Tær fáast í øllum sløgum av toyi, pelsi - og eisini bundnar. So skalt tú vera í smartasta plagginum uttanyvir, so er tað eina slíka kápu, tú skalt ogna tær.



*Max Azira hevur gjørt enn eina kollektión við íblástri úr 40'unum. Víðir frakkar við ¾ ermum, sera klassiskt og feminint*



*Giorgio Armani sýnir her eina av heitu kápunum, sum vera nógv at síggja í vetrarmótanum. Hendan er úr pelsi, men tær eru í fleiri sniðum og seymaðar úr fleiri sløgum av toyi. Eisini síggja vit bundnar kápur í vetur*

